## Blatter vil hava 18 lið

FIFA-forsetin, Sepp Blatter, sum mangan hevur verið í andglettinum, setir nú fram uppskot um tal av liðum í fremstu fótbóltsrøðunum. Ein vaksandi trupulleiki hevur verið, at bestu spælararnir spæla alt ov nógvar dystir, samstundis sum ein tøtt dystarskrá gera umstøðurnar hjá landsliðsvenjarum alt truplari. Tí vil Blatter hava, at talið av liðum í fremstu deildunum í mesta lagi skal vera 18 frá kappingarárinum 2007/08. Eitt nú í Onglandi, Spania, Italia og Fraklandi er talið í dag 20.



## Drekavarp á drekin.fo

Sum nakað nýtt bjóðar heimasíðan hjá Drekanum nú eisini teimum vitjandi videoklipp, sum hava við kapprøður at gera. Til ber at síggja og hoyra samrøður, sum verða gjørdar kring róðrarnar, eins og málmyndirnar frá øllum róðrum eru at síggja. Hartil hevur heimasíðan eisini serstaka SMS-tænastu, har til ber at fáa róðrarúrslitini sendandi á fartelefon, beint sum róðrarnir eru lidnir.

**-mørk**

# Gunnar og Joan vunnu í Íslandi

**Føroysku íðkararnir vóru í toppinum, tá Føroya Triathlonfelag um vikuskiftið kappaðist í Íslandi**



*Tað gekst sera væl, tá føroyskir triathlon-íðkarar seinasta vikuskiftið kappaðust í Íslandi*

TRIATHLON

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ferðin til Íslands var liður í drúgvu fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar komandi summar, og hugaligt var at síggja, at føroysku íðkararnir longu nú tykjast vera væl fyri.

Gunnar Dahl Olsen vann leikandi lætt, og brúkti hann bara 2 tímar 6 minutti og 50 sekund. 10 minuttir aftaná kom danin Torben Gregersen við tíðini 2:16:43. Joan Bláfoss kom sum triði íðkarin við tíðini 2:19:20 , og var hon fyrst á mál av kvinnunum.

Sum heild gekst væl hjá føroyingunum. Kvinnurnar Joan Bláfoss, Anna Karina Ottosen og Súsanna Skylv Sørensen gjørdu bart. Ikki bara vunnu tær kvinnudeildini, tær vunnu eisini á flestu monnunum, so her er nakað at fara eftir á Oyggjaleikunum.

Hjá monnunum sær eisini væl út. Gunnar, sum vann kappingina, er tó í teirri óhepnu støðu, at hann, til Oggjaleikirnar má velja millum súkkling og triathlon. Men teir báðir nýggju menninir, Áslakkur og Andrass, gera stóra framgongd, so við hesum lag hava Føroyar um eitt ár eitt framúr gott triathlonlið at senda til Oyggjaleikirnar, verður mett í Triathlonfelagnum.

# Øðrvísi ítróttakapping

**Leygardagin 27. mai, varð fyrsta adventurrace-kappingin hildin í Føroyum. Vinnarar gjørdust liði hjá løgreglumonnunum við tíðini 8 tímar og 44 min**



*At laga varðar var ein av mongu uppgávunum, sum skuldu loysast á ferðini*

ADVENTURE-RACE

*Tíðindaskriv*

Áðrenn teir kundu fáa steyp handað, høvdu teir runnið frá Kvívik til Føroya Studentaskúla í Hoydølum Men tað er ikki nokk at kunna renna, tí aðrar dygdir skuldu eisini til. Navn skuldi setast á Fuglar, varðar skuldu lagast, drekar skuldu byggjast og mín sann eisini, um teir ikki skludu látast at koyra taxabil í Oslo.

Tiltakið var eitt royndartiltak og eydnaðist tað eftir umstøðunum stak væl. Næsta veruliga tiltakið verður seinasta vikuskiftið í august ella fyrsta vikuskiftið í september, og tá er tað óalmenna FM-heitið, sum kappast verður um. Kravið fyri at fyri at taka lut er, at stilla verður upp við einum liði, sum skal telja fýra persónar.

# Tølini tala

| | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ-EB/S | 2-0 | 2-5 | - | 1-0 | 3-0 | 4-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | 5-0-1 | 13-5 |
| Skála-HB | 1-1 | 1-1 | 4-3 | 3-1 | 1-3 | 0-3 | - | - | - | - | - | - | 2-2-2 | 10-12 |
| GÍ-ÍF | 3-1 | 3-0 | - | 3-2 | - | - | - | - | 2-1 | 3-1 | 3-1 | 4-1 | 7-0-0 | 21-7 |
| KÍ-B68 | - | - | - | 1-0 | 0-0 | 3-1 | 2-2 | 4-1 | 5-0 | 4-3 | 2-2 | 1-1 | 5-4-0 | 22-10 |
| B36-VB/S | - | 1-0 | - | 3-1 | 2-1 | 6-0 | 3-2 | 1-2 | 6-1 | 8-2 | 4-0 | 2-1 | 9-0-1 | 36-10 |


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.